Heilsustýrið

Barnakoppsetingarhagtøl í Føroyum 2012-2025

02.07.2026

Óðinshædd 11, 1. hædd
100 Tórshavn

(+298) 30 90 60
hst@hst.fo
www.hst.fo

Innihaldsyvirlit

1 Fororð **3**

2 Samandráttur **4**

3 Inngangur **6**

4 Háttalag **7**

5 Tilmældur aldur fyri koppsetingar **9**

6 Koppsetingarluttøka **10**

6.1 DiTeKiPol-Hib (3, 5 og 12 mðr) 11

6.2 Pneumokokkar (3, 5 og 12 mðr) 12

6.3 DiTeKiPol-endurkoppseting (5 ár) 13

6.4 MFR (15 mðr og 4 ár) 14

6.5 Samlað yvirlit 15

6.6 HPV (12 ár) 18

6.7 HPV — liðugt koppsett, eftir øki og kyni 23

7 Frávik frá tilmældum koppsetingaraldri **25**

8 Aldursbýti fyri HPV-koppsetingar **28**

9 Hugburðskanning um barnakoppsetingar **29**

10 Avmarkingar **32**

11 Samanumtøka **33**

12 Keldur **34**

13 Fylgiskjøl **35**

13.1 Fylgiskjal 1: Tøl frá stabbamyndunum fyri koppsetingarluttøku 35

13.2 Fylgiskjal 2: HPV-koppsetingarætlanin í Føroyum 41

1 Fororð

Koppseting er eitt av munabestu tiltøkunum at fyribyrgja, at álvarsamar smittusjúkur breiða seg í Føroyum. Barnakoppsetingarætlanin hevur tí ein týðandi leiklut í at verja bæði einstaka barnið og samfelagið sum heild. Tá koppsetingarluttøkan er nóg høg, fæst floksimmunitetur, og smittan hevur verri við at breiða seg. Hetta verjir samstundis tey, sum ikki kunnu koppsetast, ella sum ikki fáa fulla verju av koppseting.

Endamálið við frágreiðingini er at lýsa, hvussu nógv børn í Føroyum eru koppsett móti teimum smittusjúkum, vit verja móti við barnakoppsetingarætlanini. Í frágreiðingini eru hagtøl um koppsetingar, sum eru givnar í árunum 2012–2025 fyri børn fødd í tíðarskeiðnum 2000-2025.

Frágreiðingin er útgivin av Heilsustýrinum, sum yvirtók farsóttarøkið frá Landslæknanum 1. januar 2024. Vit takka Lars Fodgaard Møller, landslækna, og Jóhonnu Ljósá Hansen, cand.scient.med., fyri gott samstarv um frágreiðingina.

2 Samandráttur

Hetta er fyrsta frágreiðingin hjá Heilsustýrinum um koppsetingarluttøku í føroysku barna-koppsetingarætlanini. Hagtølini byggja á skrásetingar um koppseting árini 2012-2025 og eru avmarkað til persónar, sum vóru skrásettir at búgva í Føroyum 31. desember 2025. Hetta hevur týdning fyri samanberingar við frágreiðingina, sum Landslæknin gav út í 2024, sum bygdi á føðiárgangir fyri børn, sum eru fødd í Føroyum. Í hesi frágreiðingini eru hin vegin øll úr árgangunum, sum vóru búsitandi í Føroyum 31. desember 2025, tikin við - eisini tey, sum eru tilflytarar.

DiTeKiPol-Hib og Pneumokokkar (3, 5 og 12 mðr)

Luttøkan hevur verið støðug. Prosentparturin av teimum, ið hava verið búsitandi í Føroyum, tá tey hava verið í tilmælda koppsetingaraldri, men ikki hava skrásetta koppseting, hevur ligið javnt árini 2012-2023 millum 1,2 % og 5,1 %. Vit vita ikki, hvussu nógv av teimum, sum hava búð uttanlands, eru koppsett.

DiTeKiPol-endurkoppseting (5 ár)

Prosentparturin av árgangunum 2012–2019, sum hava skrásetta koppseting, hevur ligið støðugt millum 77 % og 83 %. Hjá árgangi 2020 er prosentparturin 56 %. Hetta fallið bendir á, at nógv børn ikki verða koppsett rættstundis. Prosentparturin av teimum, sum eru skrásett at búgva í Føroyum, tá tey fyltu 5 ár, men ikki hava skrásetta koppseting, er stórur - heili 18 % fyri árgang 2019 og 43 % fyri árgang 2020. Hesir árgangir hava havt aldur til koppsetingina við árslok 2025.

MFR (15 mðr)

Prosentparturin av teimum, sum hava búð í Føroyum, tá tey høvdu aldur til koppsetingina, men ikki hava koppseting skrásetta, var 3,6-6,4 % árini 2012-2019, og er hækkaður til 9,9 % fyri árgang 2022 og 10,3 % fyri árgang 2023. Øll í árgangi 2024 hava ikki rokkið aldrinum fyri koppsetingina enn við árslok 2025.

MFR (4 ár)

Sum við fyrru MFR-koppsetingini er parturin av teimum, sum vóru búsitandi í Føroyum, tá tey fyltu 4 ár, men ikki eru koppsett, støðugt hækkaður seinastu árini, og er heili 15 % fyri árgang 2020. Fyri árgang 2021 er hetta talið 38 % og gevur ábending um, at nógv børn ikki verða koppsett rættstundis.

HPV — gentur

Prosentparturin av gentum, sum eru liðugt koppsettar, er fallið frá 70 % fyri árgang 2007 til 45 % fyri árgang 2012. Í 2024 vóru einans 50 % av gentum liðugt koppsettar á 15 ára føðingardegnum. Hetta er langt niðan fyri málið hjá WHO, sum sigur at 90 % av gentum skulu vera liðugt koppsettar, áðrenn tær gerast 15 ár.

HPV — dreingir

Ókeypis tilboð um HPV-koppseting til dreingir byrjaði 19. juli 2019, og luttøkan hjá árgangi 2008 er hægst, tá 47 % av dreingjum vóru liðugt koppsettir. Síðan tá er talið fallið og var 34 % fyri árgang 2012. Í 2024 vóru einans 26 % av dreingjum liðugt koppsettir, tá teir fyltu 15 ár.

Seinkingar í mun til tilmælda koppsetingartíð

Seinkingin verður størri og størri eldri barnið verður, við miðvirði á 6 dagar fyri 3 mðr, 15 dagar fyri 5 mðr og 28 dagar fyri 12 mðr koppsetingina. Miðvirðið fyri MFR koppsetingarnar er ávikavist 51 og 59 dagar ov seint, meðan miðvirði fyri 5 ára koppsetingina er 66 dagar ov seint.

3 Inngangur

Koppseting fyribyrgir, at smittusjúkur breiða seg í Føroyum. Tá koppsetingarluttøkan í einum bólki er nóg høg, fæst floksimmunitetur, og smittan hevur ikki líkindi at breiða seg.

Floksimmunitetur merkir, at ein nóg stórur partur av fólkinum er vorðin mótstøðuførur eftir koppseting ella eftir at hava verið smittaður við einari sjúku. Tá ið mótstøðuførið móti einari sjúku er høgt í fólkinum, minkar vandin fyri útbrotum av smittusjúkum. Tess fleiri verða koppsett, tess færri kunnu bera smittuna víðari. Stór undirtøka fyri koppseting verjir samstundis tey, sum ikki kunnu koppsetast, tí tey annaðhvørt eru ov ung ella ov sjúk.

Koppseting hevur millum annað verið við til, at pokur eru útruddaðar um allan heimin, og at fleiri sjúkur, teirra millum meslingar, hava fingið støðu sum útruddaðir í fleiri londum. Ein sjúka er at kalla útruddað, tá hon ikki longur kann breiða seg í samfelagnum, tí tey flestu eru mótstøðufør.

Fleiri av álvarsligastu sjúkunum, sum koppsett verður ímóti í barnakoppsetingarætlanini, vóru áður vanligar, men eru í dag nærum horvnar í Føroyum. Ein orsøk til hetta er, at undirtøkan fyri koppseting hevur verið høg. Sjúkurnar, sum koppsett verður ímóti, elva tó framvegis til útbrot í øðrum londum og kunnu tí koma aftur, um fólk ikki framhaldandi lata seg koppseta.

Í Føroyum fáa øll børn tilboð um ókeypis koppseting móti 10 smittusjúkum, sum allar kunnu vera álvarsligar hjá børnum: difteri, stívkrampi, kikhosti, polio, Haemophilus influensa typa b (Hib), pneumokokksjúka, meslingar, fárasjúka, reydlingar og HPV.

Lesast kann um sjúkurnar, koppsett verður ímóti, á www.hst.fo.

Hetta er fyrsta frágreiðingin hjá Heilsustýrinum um koppsetingarluttøkuna í føroysku barna-koppsetingarætlanini, og hagtøl verða útgivin regluliga framyvir.

4 Háttalag

Dátugrundarlagið undir frágreiðingini er úttak úr Cosmic, sum er felags journalskipanin í føroyska Heilsuverkinum, og Landsfólkayvirlitið. Tølini fevna um, men eru ikki avmarkað til, skrásetingar av veitingum, skrásetingar í journal í kommunulæknaviðtalum og skrásetingar av koppsetingum givnar á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í sambandi við gransking. Frágreiðingin er avmarkað til skrásetingar gjørdar í tíðarskeiðnum 2012-2025. Upplýsingar um búðstaðarøki og fólkatal í økjunum per 31. desember 2025 koma frá Landsfólkayvirlitinum.

Koppsetingarluttøkan er roknað sum lutfallið millum tey, sum eru koppsett, og børnini í sama árgangi, sum vóru skrásett at búgva í Føroyum 31. desember 2025 sambært Fólkayvirlitinum. Gjørt verður sostatt upp á ein øðrvísi hátt enn í frágreiðingini hjá Landslæknanum frá 2024.

Hagtølini fevna um:

- HPV: árgangir 2000–2013
- Aðrar koppsetingar: árgangir 2012–2025

Koppsetingarnar eru flokkaðar eftir upprunaligum koppsetingarteksti og skrásetingarkotum í hesar høvuðsbólkar: DiTeKiPol-Hib, DiTeKiPol, pneumokokkar, MFR, HPV og annað. Fyrisitingarligar ískoytisskrásetingar og aðrar ikki-kliniskar skrásetingar, eitt nú 8701, 8705, 8706, BPNB92 og “Tillæg”, vórðu flokkaðar sum “annað” og ikki brúktar sum sjálvstøðugar koppsetingar í greiningini. Fleiri skrásetingar av somu koppseting hjá sama barni vórðu lagdar saman til eina koppseting, um tær vóru skrásettar í sama 30 daga tíðarskeiði.

Talið av skamtum (dosum) er roknað út eftir somu reglum sum *Statens Serum Institut* brúkar.[1] Í førum, har koppsetingarkotan og/ella tekstur ikki kann brúkast at áseta hvønn skamt talan er um, verður tal av koppsetingum brúkt og síðan aldur. Hevur eitt barn ikki fingið allar koppsetingarnar, verður aldurin brúktur, sum lýst niðanfyri. Hetta stig hevur týdning fyri hagtølini, tí nógv børn flyta millum útlond og Føroyar, og koppsetingar, sum eru skrásettar uttanlands, verða ikki sjálvvirkandi skrásettar í Føroyum.

Nógv børn eru, sum flyta millum Føroyar og útlond, og nógv teirra búgva møguliga ikki í Føroyum, tá tey eru í tilmælda aldri fyri ymsu barnakoppsetingarnar. Sum heild hava vit ongar koppsetingardátur fyri henda bólkin. Hesi eru bólkað fyri seg í greiningini, tí sannlíkindi eru fyri, at ein stórur meiriluti av hesum børnunum hava fingið koppsetingarnar í eitt nú Danmark.

DiTeKiPol-Hib og pneumokokkar

Um eitt barn ikki hevur tríggjar skamtir skrásettar, verður aldurin á barninum brúktur til at definera, hvønn skamt talan er um. Tá verður ein koppseting definerað sum 5 mðr koppseting, um koppsetingin er skrásett, tá barnið var millum 5 og 12 mánaðir. Eru tvær koppsetingar givnar, tá barnið var 5-12 mánaðir, verður onnur definerað sum 3 mðr og hin sum 5 mðr. Er koppsetingin skrásett, tá barnið var eldri enn 12 mánaðir, verður koppsetingin definera sum ein 12 mðr koppseting.

[1] Dátugrundarlag á https://statistik.ssi.dk/

MFR

Um eitt barn ikki hevur tveir skamtir skrásettar, verður aldurin á barninum brúktur til at definera, hvønn skamt talan er um. Tá verður ein koppseting definerað sum 15 mðr koppseting, um koppsetingin er skrásett, tá barnið er yngri enn 4 ár, og definerað sum 4 ára koppseting, um barnið er eldri enn 4 ár.

HPV

HPV-hagtølini eru gjørd upp sambært leiðreglunum hjá WHO. Gentur og dreingir eru at rokna sum liðugt koppsett, um tey hava fingið tríggjar skamtir, ella um tey hava fingið tveir skamtir og fyrri skamturin varð givin, áðrenn tey gjørdust 15 ár, og tað ikki ganga færri enn 5 mðr/152 dagar millum fyrsta og annan skamt. Liðugt koppsett/-ur, tá tú fyllir 15 ár er sama mát, men bert skamtir, givnir áðrenn barnið gerst 15 ár, verða taldir.

Filtrering

Í teimum førum har ein koppseting er skrásett hjá einum barni, sum er yngri enn tað, sum koppsetingin er góðkend til (t.d. HPV undir 9 ár, DiTeKiPol-endurkoppseting áðrenn barnið er 3 ár, ella MFR tá barnið er yngri enn 6 mðr), er skrásetingin kannað nærri. Er onnur aldurshóskandi koppseting skrásett í eini aðrari keldu í Cosmic innan 7 dagar frá “feilskrásetingini”, t.d. DiteKiPol-Hib og pneumokokkar innan 7 dagar frá skráseting av HPV-koppseting hjá 1 ára gomlum barni, er aldurshóskandi skrásetingin tikin sum tann rætta, og HPV-skrásetingin er filtrerað frá í greiningini. Um aldurshóskandi skráseting ikki finst, verður “feilskrásetingin” standandi, men eyðmerkt.

Yvirlit av dátum, sum eru ruddaðar úr dátusettinum, kunnu umbiðast frá Heilsustýrinum.

5 Tilmældur aldur fyri koppsetingar

Tilmældur aldur	Koppseting
3 mðr	DiTeKiPol-Hib 3 mðr og Pneumokokkar 3 mðr
5 mðr	DiTeKiPol-Hib 5 mðr og Pneumokokkar 5 mðr
12 mðr	DiTeKiPol-Hib 12 mðr og Pneumokokkar 12 mðr
15 mðr	MFR 15 mðr
4 ár	MFR 4 ár
5 ár	DiTeKiPol 5 ár
12 ár	HPV 1 og HPV 2

6 Koppsetingarluttøka

Ávirkanin av flyting millum Føroyar og útlond sæst beinleiðis á koppsetingarluttøkuni. Tí eru tølini fyri koppsetingarnar gjørd upp í tríggjar bólkar. Myrkablái liturin vísir prosentpartin av árgangunum, sum vóru skrásett at búgva í Føroyum 31. desember 2025 og høvdu ávísar barnakoppsetingar skrásettar í Cosmic. Grái bólkurin vísir prosentpartin av árgangunum, sum búði í Føroyum 31. desember 2025, og sum ikki høvdu ávísar barnakoppsetingar skrásettar, og búðu uttanlands, tá tey rukku aldrinum fyri tilmældu koppsetingarnar (3 mðr, 5 mðr, 12 mðr, 15 mðr, 4 ár og 5 ár). Bólkurin, sum verður vístur við ljósabláum, er tey, sum vóru skrásett at búgva í Føroyum 31. desember 2025 OG tá tey rukku aldrinum fyri tilmældu koppsetingarnar, men koppsetingin ikki er funnin í Cosmic. Legg til merkis, at upp til 21 % av ymsu árgangunum ikki búðu í Føroyum, tá tey vóru í aldrinum, tá tey áttu at fáa fyrstu tilmældu koppsetingarnar. Sannlíkindini eru stór fyri, at hesi eru koppsett uttanlands.

6.1 DiTeKiPol-Hib (3, 5 og 12 mðr)

DiTeKiPol-Hib-koppsetingin verður givin, tá barnið er 3, 5 og 12 mánaðir saman við Pneumokokk-koppsetingini. Ein høg luttøka er týdningarmikil, tí hesar koppsetingar verja móti sjúkum, sum kunna verða álvarsligar fyri smábørn. Talan er um difteri, stívkrampa, kikhosta, barnalamning (polio) og meningitis.

Koppseting hevur havt við sær, at hesar sjúkur nærum eru útruddaðar um okkara leiðir. Tó eru útbrot javnan í øðrum londum. Fyri at sjúkurnar ikki skulu hava líkindi at breiða seg í Føroyum, skulu oman fyri 95 % av fólkunum vera koppsett. Undantikið er stívkrampi, sum stendst av smittu við eini bakteriu, ofta gjøgnum sár. Stívkrampi smittar ikki millum fólk, og hópimmunitetur verjir sostatt ikki fólk móti stívkrampa.



Mynd 1: Koppsetingarluttøka fyri DiTeKiPol-Hib í Føroyum, árgangir 2012–2024. Hvør stabbi telur 100 %: koppsett (myrkablátt); ikki búsitandi í FO í tilmælda koppsetingaraldri (grátt); búsitandi í FO í tilmælda koppsetingaraldri, men ikki koppsett (ljósablátt). Brotastrikan vísir 95 %, sum er WHO-málið. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

Prosentparturin av teimum, ið hava búð í Føroyum í tilmælda koppsetingaraldri, men ikki hava skrásetta koppseting, hevur ligið javnt árini 2012–2023 millum 1,2 % og 5,1 % (mynd 1, ljósablátt). Ganga vit út frá, at tey, ið ikki búðu í Føroyum tilmælda koppsetingaraldur, eru koppsett, so eru útvið 95 % av árgangum 2012-2023 koppsett. Árgangur 2024 hevur lægri luttøku fyri 12 mðr koppsetingina. Hetta er væntandi orsakað av seinking.

6.2 Pneumokokkar (3, 5 og 12 mðr)

Koppsetingin verður givin saman við DiTeKiPol-Hib, og tølini kunnu tí væntast at vera tey somu sum fyri DiTeKiPol-Hib.

Pneumokokkkoppsetingin hevur havt við sær eitt stórt fall í tilburðum av meningitis og blóðeitran hjá børnum undir 2 ár, síðan hon gjørdist partur av føroysku barnakoppsetingarætlanini í 2008.



Mynd 2: Koppsetingarluttøka fyri pneumokokkar í Føroyum, árgangir 2012–2024. Hvør stabbi telur 100 %: koppsett (myrkablátt); ikki búsitandi í FO í tilmælda koppsetingaraldri (grátt); búsitandi í FO í tilmælda koppsetingaraldri, men ikki koppsett (ljósablátt). Brotastrikan vísir 95 %, sum er WHO-málið. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

Undirtøkan fyri pneumokokkkoppsetingini er so at siga eins sum fyri DiTeKiPol-Hib, og tað er væntað, tí hesar koppsetingarnar verða givnar samstundis, tá barnið er tríggjar, fimm og tólv mánaðir.

6.3 DiTeKiPol-endurkoppseting (5 ár)

DiTeKiPol-endurkoppseting verður givin sum partur av 5-ára barnakanningini fyri at leingja um verjuna av grundkoppsetingini. Endurkoppsetingin gevur minst 10 ára verju móti difteri og stívkrampa, 5-10 ára verju móti kikhosta, og lívlanga verju móti barnalamningi (polio).



Mynd 3: Koppsetingarluttøka fyri DiTeKiPol-endurkoppseting (5 ár) í Føroyum, árgangir 2012–2024. Hvør stabbi telur 100 %: koppsett (myrkablátt); ikki búsitandi í FO í tilmælda koppsetingaraldri (grátt); búsitandi í FO í tilmælda koppsetingaraldri, men ikki koppsett (ljósablátt). Brotastrikan vísir 95 %, sum er WHO-málið. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

Prosentparturin av árgangum 2012–2019, sum hava skrásetta koppseting, hevur ligið støðugt millum 77 % og 83 %. Hjá árgangi 2020 er prosentparturin 56 %. Hetta fallið gevur ábending um, at nógv børn ikki verða koppsett rættstundis.

Prosentparturin av teimum, sum eru skrásett at búgva í Føroyum á 5 ára føðingardegnum, men ikki hava skrásetta koppseting, er støðugt hækkaður síðan 2014, og er stórur — heili 18 % fyri árgang 2019 og 43 % fyri árgang 2020 (fylgiskjal 1, talva 7.9 og mynd 18). Hesir árgangir hava havt aldur til koppsetingina við árslok 2025. Lækkingin í undirtøkuni fyri koppsetingini er álvarslig, tí børnini eru ikki fullt vard móti sjúkum sum difteri, stívkrampa og barnalamningi uttan endurkoppsetingina.

DiTeKiPol-koppseting er ókeypis til øll børn undir 18 ár. Harumframt kunnu barnakonur verða koppsettar móti kikhosta fyri at verja barnið fyrstu tríggjar mánaðirnar, til barnið sjálvt hevur aldur til at verða koppsett.

6.4 MFR (15 mðr og 4 ár)



Mynd 4: Koppsetingarluttøka fyri MFR í Føroyum, árgangir 2012–2024. Hvør stabbi telur 100 %: koppsett (myrkablátt); ikki búsitandi í FO í tilmælda koppsetingaraldri (grátt); búsitandi í FO í tilmælda koppsetingaraldri, men ikki koppsett (ljósablátt). Brotastrikan vísir 95 %, sum er WHO-málið. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

Prosentparturin av børnum, sum búðu í Føroyum, tá tey vóru 15 mánaðir, men ikki eru koppsett, lá árini 2012 til 2019 millum 3,6 % og 6,4 %. Síðan 2020 er hesin partur hækkaður munandi til 10,3 % fyri árgang 2023 og 51,4 % fyri árgang 2024 (mynd 4 ovast, ljósablátt). Ikki øll børn í árgangi 2024 hava enn havt aldur til koppsetingina við árslok 2025.

Undirtøkan fyri 4 ára koppsetingina sær eisini út til at vera minkað síðan árgang 2015, tá 7,2 % av teimum, sum vóru búsitandi í Føroyum á 4 ára føðingardegnum vóru ókoppsett, til heili 15,2 % fyri árgang 2020 (fylgiskjal 1, talvur 7.7-7.8 og mynd 18). Allur árgangur 2020 hevur havt aldur til at vera liðugt koppsettur.

Fyri MFR-koppsetingina er málið, at 95 % av øllum børnum eru liðugt koppsett. Koppsetingin verjir móti meslingum, fárasjúku og reydlingum, og tveir skamtir væntast at geva lívlanga verju. Meslingar er mest smittandi barnasjúkan og kunnu m.a. elva til meningitis. Fárasjúka kann hava við sær bruna í eistunum (testiklunum) og elva til verri gitnaðarføri hjá dreingjum, umframt at hon kann elva til meningitis. Reydlingar eru serliga vandamiklir fyri barnakonur, sum ikki eru koppsettar. Reydlingar hjá børnum byrja oftast við krími og eitt sindur av fepri, og síðani kann útbrot koma á húðina. Verður ein barnakona, sum ikki er koppsett ella hevur havt reydlingar, smittað í fyrru helvt av burðartíðini, er stórur vandi fyri spontanari abort, deyðføðing ella álvarsligari vanskapan hjá barninum.

Tølini fyri MFR-koppseting vísa, at vit liggja langt undir málinum um hópverju, sum hevur til endamáls at fyribyrgja, at hesar sjúkur kunnu breiða seg í Føroyum. Meslingar ganga javnan í Evropa, og eitt útbrot er í gongd í Bulgaria. Viðvíkjandi reydlingum síggjast flestu tilburðir í ES í løtuni í Póllandi.

Mælt verður øllum kvinnum yvir 18 ár, sum ikki hava havt reydlingar og ikki eru koppsettar, til at verða koppsettar fyri at verja komandi børn í móðurlívi. Koppsetingin kann ikki gevast eftir, at kvinnan er vorðin við barn.

MFR-koppseting er ókeypis til øll børn undir 18 ár, umframt vaksin, sum ikki eru koppsett.

6.5 Samlað yvirlit

Í talvu 1 niðanfyri sæst hvussu stórur prosentpartur av árgangum 2012 til 2025, sum búðu í Føroyum 31. desember 2025, hava fingið ávísu koppsetingarnar. Prosentparturin av teimum, sum búðu uttanlands, tá barnið var í tilmælda aldri fyri ymisku koppsetingarnar, er vístur í klombrum. Upp til 21 % av ymsu árgangunum búðu ikki í Føroyum, tá tíð var til tilmældar koppsetingar. Dátur fyri hesi børn mangla.

Talva 2 niðanfyri vísir prosentpartin av børnum, sum vóru skrásett at búgva í Føroyum tilmældar koppsetingardagar, men ikki hava skráseting í føroysku journalskipanini. Tølini eru støðug fyri koppsetingarnar, barnið fær fyrsta árið. Fyri MFR-koppsetingarnar og DiTeKiPol-endurkoppsetingina er talið av teimum ókoppsettu vaksandi. Fyrivarni skal takast fyri, at børn kunnu vera flutt til ella úr Føroyum og kunnu vera koppsett aðrastaðni í tíðini undan ella eftir tilmælda koppsetingardagin.

Tølini handan stabbamyndirnar, sum vísa koppsetingarluttøku, síggjast í fylgiskjali 1.

Talva 1: DiTeKiPol-Hib, pneumokokkar og MFR fyri Føroyar, árgangir 2012–2025: % koppsett (% búsitandi uttanlands). Talið í klombrum er prosentparturin av árganginum, sum ikki búði í Føroyum í tilmælda koppsetingaraldri (grátt í Mynd 1–4). Tómir teigar merkja, at árgangurin ikki hevur aldur til koppsetingina. * merkir, at øll í árganginum ikki hava rokkið tilmældum koppsetingaraldri við árslok 2025.

Koppseting	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022	2023	2024	2025
DiTeKiPol-Hib 3 mðr	77 (20)	80 (19)	79 (19)	78 (20)	81 (17)	81 (16)	82 (15)	81 (16)	88 (11)	87 (9)	88 (9)	90 (7)	90 (5)	64 (1)*
DiTeKiPol-Hib 5 mðr	76 (21)	78 (19)	77 (21)	78 (20)	81 (17)	82 (16)	83 (15)	82 (16)	88 (11)	90 (9)	88 (8)	90 (7)	92 (4)	41 (1)*
DiTeKiPol-Hib 12 mðr	76 (20)	80 (17)	76 (21)	79 (18)	83 (15)	84 (14)	84 (13)	83 (13)	87 (10)	89 (7)	89 (7)	91 (5)	80 (2)	0 (0)
DiTeKiPol 5 ár	77 (11)	83 (8)	80 (8)	80 (7)	81 (6)	81 (5)	80 (3)	79 (3)	56 (1)	–	–	–	–	–
Pneumokokkar 3 mðr	77 (20)	78 (19)	78 (19)	77 (20)	81 (17)	81 (16)	82 (15)	81 (16)	88 (11)	87 (9)	88 (9)	90 (7)	90 (5)	64 (1)*
Pneumokokkar 5 mðr	74 (21)	78 (19)	77 (21)	77 (20)	81 (17)	81 (16)	82 (15)	81 (16)	87 (11)	89 (9)	88 (8)	90 (7)	91 (4)	41 (1)*
Pneumokokkar 12 mðr	75 (20)	78 (17)	76 (21)	77 (19)	81 (15)	84 (13)	82 (13)	82 (13)	85 (10)	87 (7)	89 (7)	91 (5)	79 (2)	0 (0)
MFR 15 mðr	75 (20)	78 (17)	76 (19)	77 (17)	84 (13)	84 (13)	81 (13)	82 (12)	82 (10)	86 (7)	84 (6)	85 (4)	48 (1)*	–
MFR 4 ár	80 (13)	84 (10)	84 (10)	83 (10)	85 (7)	86 (6)	85 (5)	84 (6)	81 (3)	60 (2)	–	–	–	–

Talva 2: DiTeKiPol-Hib, pneumokokkar og MFR fyri Føroyar, árgangir 2012–2025: prosentparturin av hvørjum árgangi, sum búði í Føroyum í tilmælda koppsetingaraldri, men ikki er koppsettur (ljósablátt í Mynd 1–4). Tómir teigar merkja, at árgangurin ikki hevur aldur til koppsetingina. * merkir, at øll í árganginum ikki hava rokkið tilmældum koppsetingaraldri við árslok 2025.

Koppseting	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022	2023	2024	2025
DiTeKiPol-Hib 3 mðr	3,1	1,8	2,0	2,4	2,2	2,3	2,9	2,5	1,2	3,6	3,1	3,0	5,5	34,6*
DiTeKiPol-Hib 5 mðr	3,4	2,3	1,6	2,4	2,1	2,7	2,4	2,5	1,6	1,8	3,7	3,2	3,8	58,3*
DiTeKiPol-Hib 12 mðr	3,5	2,9	3,0	2,7	2,6	2,1	3,2	3,6	3,3	3,5	3,4	4,3	18,7	99,8
DiTeKiPol 5 ár	11,7	8,2	12,2	12,5	13,4	14,0	16,6	18,4	43,0	–	–	–	–	–
Pneumokokkar 3 mðr	3,6	3,0	3,0	2,7	2,4	3,0	3,0	2,8	1,2	4,0	3,1	3,0	5,5	34,8*
Pneumokokkar 5 mðr	5,1	3,3	2,2	3,1	2,4	3,2	2,9	3,0	1,8	2,0	4,0	3,2	4,5	58,4*
Pneumokokkar 12 mðr	4,3	4,5	3,7	4,0	4,3	2,6	4,5	4,9	4,5	5,5	3,9	4,8	19,7	99,8
MFR 15 mðr	5,2	5,3	4,9	5,6	3,6	3,7	6,4	5,6	8,3	7,6	9,9	10,3	51,4*	–
MFR 4 ár	6,8	5,8	5,7	7,2	7,9	8,1	9,6	10,7	15,2	38,3	–	–	–	–

6.6 HPV (12 ár)

HPV stendur fyri Humant Papillomavirus. Yvir 200 sløg av HPV eru til, og HPV-koppsetingin verjir móti níggju sløgum. HPV kann elva til krabbamein í lívmóðurhálsinum, krabba í penis, krabba í innaru og ytru kynsgøgnunum hjá kvinnum, baktarmskrabba og krabba í varrum, munnholu ella svølgi.

HPV kann eisini elva til kynsfinnur, sum eru vørtur á kynsgøgnunum, hjá báðum kynum.

Gentur

Tilboðið um HPV-koppseting til gentur byrjaði 1. januar 2009. Frá 2012 til juli 2019 kundu gentur og kvinnur fáa ókeypis koppseting, til tær vóru 28 ár. Síðan 2019 hevur tilboðið verið avmarkað til gentur 12-17 ár.

HPV-koppseting gevur útvið 90 % verju móti lívmóðurhálskrabba, umframt at hon verjir móti øðrum sløgum av HPV-elvdum krabbameini.



Mynd 5: Liðugt koppsettar gentur, árgangir 2000–2012. Blá linja = liðugt koppsettar. Grá linja = liðugt koppsettar umframt tær, sum ikki búðu í Føroyum á 12 ára føðingardegnum. Brotastrikan vísir 90 %, sum er WHO-málið. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

Prosentparturin av gentum, sum eru liðugt koppsettar móti HPV, var størst fyri árgang 2007 við knapt 70 %, og er síðan minkaður nógv til 55 % fyri árgang 2011 og 45 % fyri árgang 2012 (mynd 5, bláa linjan). Eitt barn verður mett at vera liðugt koppsett, um tað hevur fingið tríggjar skamtir, ella um tað hevur fingið tveir skamtir, har fyrsti skamturin varð givin, áðrenn barnið bleiv 15 ár, og tað ganga minst fimm mánaðir millum fyrsta og annan skamt. Hetta er í samsvari við leiðreglurnar hjá WHO, og er sama definitión, sum verður brúkt í Danmark. Tann gráa linjan vísir prosentpartin av gentum, sum eru liðugt koppsettar, umframt tær, sum vóru skrásettar at búgva uttanlands á 12 ára føðingardegnum. Hesar hava vit ikki dátur fyri, men hugsandi er, at ein partur av teimum er koppsettur uttanlands.



Mynd 6: Liðugt HPV-koppsettar á 15 ára føðingardegnum (Gentur, 2024) — Føroyar samanborið við onnur Norðurlond. Koppsetingarluttøka á 15 ára føðingardegnum 2024 = lutfall av teimum, ið fylla 15 ár í 2024 (fødd 2009), sum eru liðugt koppsettar. Brotastrikan vísir 90 %, sum er WHO-málið. Útlendskar talvur: ECDC, State of HPV vaccination programmes in the EU/EEA 2025, Annex 7. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

Tøl frá 2024 fyri, hvussu nógvar føroyskar gentur frá árgangi 2009 eru liðugt koppsettar áðrenn tær fylla 15 ár, vísa, at vit liggja á 50 % (mynd 6). Málið í Føroyum er tað sama, sum WHO hevur ásett: at 90 % av gentum eru liðugt koppsettar, áðrenn tær fylla 15 ár. Hetta tí at koppsetingin gevur størstu verjuna, um hon verður givin, áðrenn barnið kann verða smitta við HPV fyrstu ferð. Ísland og Noreg liggja oman fyri málið, meðan Svøríki og Danmark liggja undir. Tó liggja øll londini oman fyri 82 %.

HPV-koppsetingin gevur útvið 90 % verju móti lívmóðurhálskrabba, um gentan verður koppsett, áðrenn hon verður smittað við HPV fyrstu ferð. Tí verður tilmælt, at gentur eru liðugt koppsettar, áðrenn tær fylla 15 ár. Ein stór koppsetingarundirtøka kann hava við sær, at vit kunnu útrudda lívmóðurhálskrabba í Føroyum.

Dreingir

Síðan 2019 hevur HPV-koppseting verið tilmæld øllum dreingjum, sum ein 12-ára koppseting.

Hjá monnum kann HPV elva til krabbamein í varrum, munnholu, svølgi, baktarminum og penis. Serliga er talið á tilburðum av krabba í varrum, munnholu og svølgi hjá monnum vaksið nógv seinastu árini, og ein vaksandi partur (uml. 60 %) stendst orsakað av HPV-sløgum, sum eru fevnd av koppsetingini.

Seinastu 10 árini hava líka nógvir menn fingið krabba í varrar, munnholu og svølg, sum kvinnur hava fingið staðfest lívmóðurhálskrabba.[2]

HPV er orsøk til nærum allar tilburðir av baktarmskrabba og er orsøk til yvir helvtina av tilburðum av krabba í penis.



Mynd 7: Liðugt koppsettir dreingir, árgangir 2000–2012. Blá linja = liðugt koppsettir. Grá linja = liðugt koppsettir umframt teir, sum ikki búðu í Føroyum á 12 ára føðingardegnum. Tilboð um ókeypis HPV-koppseting til dreingir byrjaði 19. juli 2019; árgangir 2001 og eldri fingu ikki tilboð um koppseting. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

Prosentparturin av dreingjum, sum eru liðugt koppsettir móti HPV, var størst fyri árgang 2008 við 47 %, og er síðan minkaður til 37 % fyri árgang 2011 og 34 % fyri árgang 2012 (mynd 7, bláa linjan). Tann gráa linjan vísir prosentpartin av koppsettum dreingjum, umframt teir, sum búðu uttanlands á 12 ára føðingardegnum. Sum hjá gentunum kann hugsast, at ein partur av hesum eru koppsettir uttanlands.

HPV-koppseting kann fyribyrgja krabbamein hjá báðum kynum. Tí er koppsetingin tilmæld øllum børnum, tá tey fylla 12 ár.

[2]Kelda: NORDCAN, https://nordcan.iarc.fr/



Mynd 8: Liðugt HPV-koppsettir á 15 ára føðingardegnum (Dreingir, 2024) — Føroyar samanborið við onnur Norðurlond. Koppsetingarluttøka á 15 ára føðingardegnum 2024 = lutfall av teimum, ið fylla 15 ár í 2024 (fødd 2009), sum eru liðugt koppsettir. Útlendskar talvur: ECDC, State of HPV vaccination programmes in the EU/EEA 2025, Annex 8. Dátur fyri Ísland eru ikki tøkar. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

Tøl frá 2024 vísa, at einans 26 % av føroyskum dreingjum frá árgangi 2009 vóru liðugt koppsettir, áðrenn teir fyltu 15 ár (mynd 8). Málið í Føroyum er, eins og hjá gentum, at 90 % eru liðugt koppsettir, áðrenn teir fylla 15 ár. Koppsetingin gevur bestu verjuna, um hon verður givin, áðrenn hin ungi verður smittaður við HPV fyrstu ferð. Av Norðurlondum liggur Noreg hægst við 88 % viðvíkjandi prosentparti av dreingjum, sum eru liðugt koppsettir, áðrenn teir gerast 15 ár.

Talva 3: HPV — eftir kyni og árgangi, í prosentum: liðugt koppsett, fingið HPV 1, og prosentparturin sum ikki búði í Føroyum á 12 ára føðingardegnum. Liðugt koppsett verður definerað sambært WHO sum 3 skamtir, ella 2 skamtir, tá fyrri skamtur er givin áðrenn 15 ára aldur og minst 152 dagar eru millum skamtirnar.

Kyn	Koppseting	2000	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010	2011	2012
Dreingir	**Liðugt koppsett**	3,5	3,9	10,5	17,5	28,3	34,3	34,7	41,6	46,8	40,3	39,6	36,9	34,1
Dreingir	**HPV 1**	4,5	5,4	14,7	23,4	35,7	42,3	45,9	53,0	60,2	56,8	52,1	54,3	52,2
Dreingir	**Búsitandi uttanlands**	16,3	17,1	14,4	8,2	11,7	8,0	8,8	4,8	4,5	5,5	2,8	1,1	0,5
Gentur	**Liðugt koppsett**	51,8	48,6	48,4	50,6	59,8	61,8	64,0	69,5	65,3	60,1	60,7	55,1	45,4
Gentur	**HPV 1**	62,9	61,7	60,2	63,5	70,5	72,7	77,7	80,0	79,7	72,1	72,6	74,5	63,5
Gentur	**Búsitandi uttanlands**	14,3	16,6	10,6	13,7	8,1	6,9	7,4	6,9	5,3	3,3	3,3	2,0	0,8

Talva 3 vísir, hvussu stórur prosentpartur av árgangunum er liðugt koppsettur móti HPV, hvussu nógv hava fingið fyrsta skamtin og hvussu stórur prosentpartur ikki búði í Føroyum á 12 ára føðingardegnum. Fyri allar árgangir liggja vit sera lágt. Í árgangi 2012 eru einans 45 % av gentum og 34 % av dreingjum liðugt koppsett.

Málið hjá WHO um at 90 % av gentum skulu vera liðugt koppsettar áðrenn tær verða 15 ára er *ikki* rokkið fyri nakran árgang í frágreiðingini — hægsta luttøkan er 70 %, sum er fyri árgang 2007. Hjá dreingjum, har skipanin er nógv nýggjari, er talið hægst 47 %, sum er fyri árgang 2008.

6.7 HPV — liðugt koppsett, eftir øki og kyni

HPV-luttøkan eftir øki og kyni er víst uppá tveir mátar: fyrst *liðugt koppsett* fyri árgangir 2000-2012, og síðan *liðugt koppsett á 15 ára føðingardegnum* fyri árgang 2009.



Mynd 9: Liðugt koppsett (óansæð aldur) hjá gentum (blátt) og dreingjum (ljósablátt), eftir øki og fyri Føroyar í alt. Brotastrikan vísir 90 %, sum er WHO-málið fyri HPV. Árgangir 2000–2010 (gentur) / 2002–2012 (dreingir). Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

Hyggja vit eftir hvussu stórur prosentpartur av árgangum 2000–2010 hjá gentum og 2002–2012 hjá dreingjum eru liðugt koppsett, so síggja vit størstu undirtøkuna hjá báðum kynum í Norðstreymoy og síðan Suðurstreymoy. Miðaltalið fyri Føroyar samlað sæst ovast í myndini. Undirtøkan fyri HPV-koppseting hjá hesum árgangum er lægst í Norðoyggjum fyri bæði gentur og dreingir.



Mynd 10: Liðugt koppsett á 15 ára føðingardegnum hjá gentum (blátt) og dreingjum (ljósablátt), eftir øki og fyri Føroyar í alt — árgangur 2009 (sami árgangur sum norðurlendska samanberingin í mynd 6 og 8). Brotastrikan vísir 90 %, sum er WHO-málið fyri HPV. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

Mynd 10 vísir, hvussu nógv í árgangi 2009 vóru liðugt koppsett, áðrenn tey blivu 15 ár. Samlaða talið fyri Føroyar er ovast, og er sama tal, sum er brúkt í myndum 6 og 8.

Størsti prosentparturin av gentum, sum vóru liðugt koppsettar, áðrenn tær blivu 15 ár, er í Norðstreymoy, Vága øki og Suðuroy+Sandoy. Norðoya øki liggur lægst. Flest dreingir, sum eru liðugt koppsettir á 15 ára føðingardegnum, eru í Vága øki og fæst í Norðoya øki. Tølini eru grundað á smá tøl fyri einstøku økini.

7 Frávik frá tilmældum koppsetingaraldri

Hesin parturin vísir, nær koppsetingarnar verða givnar í mun til tilmældan koppsetingaraldur. Positiv tøl merkja, at koppsetingin verður givin *seinni* enn tilmælt; negativ tøl merkja, at hon verður givin *fyrr*.

Sum heild verða børn koppsett ov seint í mun til tilmælda tíð. Vit síggja, at fyrstu koppsetingarnar liggja tætt at tilmældari tíð, og at seinkingin verður størri og størri, eldri barnið verður. Størstu seinkingarnar eru fyri 4 ára og 5 ára koppsetingarnar. Seinkingin er roknað út frá tí degi, tá barnið verður 3 mðr, 5 mðr, 12 mðr, 15 mðr, 4 ár ella 5 ár.



Mynd 11: Frávik frá tilmældum koppsetingaraldri — DiTeKiPol-Hib (3, 5 og 12 mðr). Sirkul = miðvirði; linja = niðara–ovara fjórðingsmark. Brotastrika = 0 dagar (tilmældur dagur). Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.



Mynd 12: Frávik frá tilmældum koppsetingaraldri — Pneumokokkar (3, 5 og 12 mðr). Sirkul = miðvirði; linja = niðara–ovara fjórðingsmark. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

Sirkulin vísir, hvussu nógvar dagar koppsetingarnar vóru seinkaðar (miðvirði) og linjurnar vísa spennið, sum helvtin av skrásetingunum fella innanfyri. Fyri t.d. DiTeKiPol-Hib 3 mðr er miðvirðið 6 dagar, helvtin av skrásetingunum liggja millum 1 og 15 dagar frá degnum, tá barnið verður 3 mðr, ein fjórðingur av skrásetingunum liggur áðrenn hetta, og ein fjórðingur av skrásetingunum liggur seinni.



Mynd 13: Frávik frá tilmældum koppsetingaraldri — MFR (15 mðr og 4 ár). Sirkul = miðvirði; linja = niðara–ovara fjórðingsmark. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.



Mynd 14: Frávik frá tilmældum koppsetingaraldri — DiTeKiPol 5 ár (endurkoppseting). Sirkul = miðvirði; linja = niðara–ovara fjórðingsmark. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

Tølini fyri frávik frá tilmældum koppsetingardegi fyri allar koppsetingarnar síggjast í Talvu 4.

Talva 4: Frávik frá tilmældum koppsetingardegi — miðvirði og niðara–ovara fjórðingsmark, býtt á slag av koppseting.

Koppseting	Tal av koppsetingum	Miðvirði (dagar)	Niðara fjórðingsmark (dagar)	Ovara fjórðingsmark (dagar)
DiTeKiPol-Hib 3 mðr	8.370	6	1	15
DiTeKiPol-Hib 5 mðr	8.239	15	5	33
DiTeKiPol-Hib 12 mðr	7.967	29	12	64
Pneumokokkar 3 mðr	8.334	6	1	15
Pneumokokkar 5 mðr	8.185	15	5	33
Pneumokokkar 12 mðr	7.853	28	12	62
MFR 15 mðr	7.571	51	16	126
MFR 4 ár	6.276	59	23	161
DiTeKiPol (5 ár)	5.419	66	26	177

8 Aldursbýti fyri HPV-koppsetingar

HPV-koppseting er tilmæld 12 ára gomlum, men er eitt ókeypis tilboð til øll børn millum 12 og 17 ár. Tilboðið um HPV-koppseting bleiv í juli 2019 broytt til at vera til bæði kyn, og varð avmarkað til børn 12-17 ár.

Niðanfyri sæst, hvussu gomul børn og ung hava verið, tá HPV-koppsetingar síðan 2020 hava verið givnar. Aldursbýtið er víst eftir tali av einstaklingum, fyri árgangir 2008–2013, býtt á gentur og dreingir.



Mynd 15: Aldursbýti fyri HPV-koppseting eftir tali av einstaklingum, árgangir 2008–2013, býtt á gentur og dreingir. Brotastrikur vísa aldurstíðarskeiðið, tá koppsetingin er ókeypis. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

Tey flestu, sum hava fingið fyrsta skamt seinastu fimm árini, hava verið 12 ár, og 12-13 ár, tá tey fingu annan skamt. Seinastu fimm árini hava ikki verið nógv, sum hava fingið tríggjar skamtir. Tey flestu, sum fáa tríggjar skamtir, eru 15-16 ár bæði hjá gentum og dreingjum. Um barnið er eldri enn 15 ár tá fyrsta HPV-koppsetingin verður givin skulu tríggir skamtir gevast fyri at fáa fulla verju. Tað sama er galdandi, um meira enn 13 mánaðir eru millum fyrsta og annan skamt.

9 Hugburðskanning um barnakoppsetingar

Fyri miðvíst at betra um undirtøkuna fyri barnakoppseting við átøkum, er umráðandi at skilja, hvørjir faktorar ávirka avgerðina um at koppseta ella at lata vera við at koppseta barnið. Tí gjørdi Heilsustýrið í apríl-mai 2025 eina kanning, sum hevði til endamáls at greina hugburðin hjá foreldrum í Føroyum til barnakoppseting. Kanningin snúði seg um tær koppsetingarnar, barnið fær fyrstu fimm árini.

Hugburðskanningin til barnakoppseting av egnum børnum tók støði í einum valideraðum spurnablaði um koppsetingarvilja. Koppsetingarvilji verður lýstur við sjey komponentum: *felags ábyrgd, álit, váðameting, forðingar, kalkulering, konspiratión og undirtøka fyri revsitiltøkum* (mynd 16).

Mynd 16: Teir sjey komponentarnir, sum tilsamans lýsa koppsetingarvilja. Kelda: Hugburðskanning um barnakoppseting, Heilsustýrið 2025.

Teir sjey komponentarnir verða lýstir í talvu 5.

Gott 5.300 foreldur, sum sambært Landsfólkayvirlitinum áttu børn undir 6 ár og búðu í Føroyum, vórðu boðin at luttaka gjøgnum Vangan. Innbjóðingin varð send 14. apríl 2025, og kanningin kundi svarast til 22. mai. Foreldur við fleiri børnum undir 6 ár svaraðu út frá tí barninum, sum seinast hevði føðingardag. 2.826 fólk svaraðu kanningini, tað er 53,8 % av teimum innbodnu. Av teimum, sum svaraðu, vóru 66 % kvinnur og 34 % menn, og tey eru umboðandi fyri foreldur at børnum undir 6 ár í Føroyum viðvíkjandi øki og aldri.

Talva 5: Lýsing av komponentunum fyri koppsetingarvilja.

Komponentur	Lýsing
Felags ábyrgd	Eitt ynski um at verja onnur og minka um smittubreiðslu.
Álit	Álit á heilsumyndugleikar og álit á, at koppsetingar eru tryggar og effektivar.
Váðameting	Ein fatan av at sjúkurnar, koppsett verður fyri, ikki eru vandamiklar.
Forðingar	Ein fatan av, at tað er tvørligt (besverligt) at fáa barnið koppsett.
Kalkulering	Meting av fyrimunum og vansum við koppseting fyri barnið.
Konspiratión	Trúgv á konspiratiónsástøði og falstíðindi um koppseting.
Undirtøka fyri revsitiltøkum	Undirtøka fyri revsitiltøkum móti persónum, sum ikki fylgja tilmælum um koppseting.

Býti av svarum hjá foreldrum til útvaldar útsagnir síggjast í talvu 6. Kanningin vísti, at yvirskipað er høgur koppsetingarvilji í øllum økjum, við einum miðaltali uppá 5,2 á einum stiga frá 1-7. Aldur, kyn og útbúgving hava ávirkan á hugburðin til einstøku komponentarnar. Felags ábyrgd og álit á heilsumyndugleikum liggja sera høgt, meðan trúgv á konspiratión og forðingar fyri at fáa barnið koppsett liggja lágt. Størsta spjaðingin sæst til hugburð um revsitiltøk og til kalkulering av fyrimunum og vansum (talva 6).

Hugburðskanningin gevur ikki ábending um, at fólk eru ímóti barnakoppsetingum. Tí kann hugsast, at gloymska kann vera viðvirkandi til, at børn ikki verða koppsett, ella ikki verða koppsett rættstundis.

Heilsustýrið fer í næstum at virkja eina áminningarskipan, sum sendir áminning gjøgnum Vangan til foreldur/verjar at børnum, tvær vikur áðrenn tíð er til eina tilmælda barnakoppseting. Royndir í Danmark vísa, at ein áminningarskipan kann hava sera góða ávirkan á, hvussu nógv børn verða koppsett.

Talva 6: Býti av svarum hjá foreldrum til útvaldar útsagnir, í prosentum (n = 2 826). Stigin gongur frá 1 (sera ósamd/-ur) til 7 (sera samd/-ur).

		Sera ósamd/-ur						*Sera samd/-ur*
Evni	**Útsøgn**	**1**	**2**	**3**	**4**	**5**	**6**	**7**
Felags ábyrgd	Eg síggi barnakoppsetingar sum eina felags ábyrgd við endamálinum at steðga smittubreiðslu.	1	1	1	3	6	15	73
Álit	Eg eri sannførd/-ur um, at viðkomandi myndugleikar einans loyva effektivum og tryggum barnakoppsetingum.	2	2	2	5	11	26	52
Váðameting	Eg lati barnið koppseta, tá tað er ov vandamikið fyri barnið at verða smittað.	1	1	2	6	12	21	56
Forðingar	Tað kann koma fyri, at barnið ikki fær eina koppseting, tí tað er so tvørligt (besverligt) at fáa koppsetingar.	49	22	10	10	4	2	2
Kalkulering	Eg lati bert barnið koppseta, um fyrimunirnir við koppsetingini heilt greitt eru fleiri enn vansarnir.	11	8	7	14	15	17	29
Konspiratión	Koppsetingar elva til sjúkur og ovurviðkvæmi (allergi) hjá børnum, sum eru álvarsligari enn tær sjúkurnar, koppsetingarnar eiga at verja ímóti.	44	27	10	10	3	3	3
Undirtøka fyri revsitiltøkum	Tað átti at borið til at sett inn við revsitiltøkum móti foreldrum, sum ikki fylgja tilmælunum hjá heilsumyndugleikunum um koppseting.	23	14	14	21	11	6	11

10 Avmarkingar

Hesar viðmerkingar til hagtølini í frágreiðingini eigur lesarin at vera varugur við:

- **Koppsetingar givnar uttanlands** verða ikki sjálvvirkandi skrásettar í Cosmic og eru tí ikki við í okkara tølum. Hetta kann ávirka luttøkuna fyri allar koppsetingarnar. Talan er t.d. um fyrstu koppsetingarnar eitt barn fær, meðan foreldrini eru lesandi í DK, og síðan flytur heim og fær seinnu koppsetingarnar í Føroyum.
- **Bústaður frá Landsfólkayvirlitinum per 31. desember 2025** verður brúktur sum filtur. Ein persónur, sum er fluttur uttanlands, áðrenn hesa dagfestingina, verður ikki íroknaður — heldur ikki, um persónurin er føddur og koppsettur í Føroyum.
- **Felags journalskipan frá 2011.** Síðan 2011 hava øll sjúkrahúsini og allir kommunulæknar brúkt felags journalskipanina Cosmic. Skrásetingar áðrenn 2012 kunnu tí vera ófullfíggjaðar, og frágreiðingin er tí avmarkað til skrásetingar gjørdar í tíðarskeiðnum 2012–2025.
- **WHO-definitiónin fyri HPV-liðugt-koppsett** verður brúkt í allari frágreiðingini. *Statens Serum Institut* tók henda hátt í nýtslu í juni 2019 fyri gentur 17 ár og yngri (árgangir 2001+). Fyri eldri árgangir (1998–2000) varð ein 3-skamtirs-háttur brúktur, sum gevur lægri luttøku fyri liðugt koppsett. Talvur okkara kunnu tí *ikki* samanberast beinleiðis við talvur frá Statens Serum Institut fyri elstu árgangirnar.
- **HPV-koppsetingartilboðið til gentur er broytt fleiri ferðir.** 1. januar 2009 fingu 14 ára gamlar gentur ókeypis koppseting. 1. juli 2010 varð skipanin víðkað til 13-14 ára gamlar gentur (føddar 1995 og seinni). 1. desember 2012 varð skipanin víðkað til allar 12-28 ára gamlar gentur og kvinnur. Eldru árgangirnir í frágreiðingini (2000–2001) komu tí seinni inn í skipanina enn yngru árgangirnir. Somuleiðis hevur broyting verið í koppsetingarætlanini, har gentur koppsettar áðrenn august 2014 altíð fingu tríggjar skamtir, og gentur koppsettar eftir august 2014 sum standard hava fingið tveir skamtir. Undantikið er, um gentan er eldri enn 14 ár tá hon verður koppsett fyrstu ferð, ella um longri tíð enn 13 mðr Eru millum skamt 1 og 2.
- **Tilboð um ókeypis HPV-koppseting fyri dreingir** byrjaði 19. juli 2019 fyri 12-17 ára gamlar dreingir. Árgangir 2001 og eldri vóru tá eldri enn 18 ár, og luttøkan hjá teimum árgangum er tí grundað á *eginrindaðar* koppsetingar.

11 Samanumtøka

Mest áhugaverdu úrslitini í hesi frágreiðingini eru:

Manglandi dátur

Í øllum árgangunum síggja vit stóra ávirkan av flyting millum Føroyar og útlond. Upp til 21 % av summum árgangum búðu ikki í Føroyum í tilmældum koppsetingaraldri, og ongar koppsetingardátur eru í Cosmic fyri hesi børn.

Fallið í 2020-árganginum fyri 5-ára koppsetingina

Luttøkan uppá 55 % er sera lág. Tað tykist sum, at ein partur av frágreiðingini er, at seinking er í, nær børnini fáa 5-ára koppsetingina. Áminningarskipanin hjá Heilsustýrinum kann hava positiva ávirkan á hetta, soleiðis at koppsetingarnar verða givnar nærri tilmældu tíðini.

HPV-minking hjá bæði gentum og dreingjum

Hjá gentum er luttøkan fyri liðugt koppsett minkað frá 70 % (árg. 2007) til 45 % (árg. 2012). Hjá dreingjum er luttøkan minkað frá 47 % (árg. 2008) til 34 % (árg. 2012). Vit eru sostatt langt frá málinum hjá WHO um, at 90 % av gentum eru liðugt koppsettar, áðrenn tær fylla 15 ár. Hetta er álvarsligt í sambandi við lívmóðurhálskrabba og aðrar krabbameinssjúkur, sum HPV-koppsetingin verjir móti.

Arbeiði fyri framman:

1. Fáa dátur fyri børn, sum verða koppsett í Danmark.
2. Talgild áminningarskipan til foreldur, sum minnir á komandi tilmældu barnakoppseting. Skipanin verður sett í gongd í næstum hjá Heilsustýrinum saman við Talgildu Føroyum.
3. Menna eina føroyska koppsetingarskrá, sum kann nýtast bæði at fylgja við luttøkuni og at lata foreldur sjálvi skráseta koppsetingar, sum eru givnar uttanlands.
4. Kunna og upplýsa um týdningin av barnakoppseting.
5. Átøk at økja um HPV-koppseting.
6. Greina hagtøl regluliga fyri at fylgja gongdini.

12 Keldur

1. Logir.fo. *Kunngerð nr. 151 frá 29. oktober 2020 um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum*, sum seinast broytt við kunngerð nr. 105 frá 28. september 2023.
2. Statens Serum Institut. *https://statistik.ssi.dk/*.
3. Landslæknin *Statusrapport — Børnevaccinationsprogrammet på Færøerne frem til 2024*, 2024.
4. Hagstova Føroya. *Fólkatalsbroytingar*, 2025.
5. World Health Organization. *Immunization Agenda 2030*. WHO, 2021.
6. World Health Organization. *Global strategy to accelerate the elimination of cervical cancer as a public health problem*. WHO, 2020.
7. Logir.fo. *Kunngerð nr. 116 frá 19. juli 2019 um broyting í kunngerð um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum*.
8. European Centre for Disease Prevention and Control (ECDC). *State of HPV vaccination programmes in the EU/EEA, 2025*. Stockholm: ECDC, 2025. (Heimild fyri norðurlendsku samanseting; Annex 7 — gentur, Annex 8 — dreingir; síðsti skamtur í 15 ára aldri, 2024.)
9. World Health Organization Regional Office for Europe. *Effective communication of immunization data*. Copenhagen: WHO Regional Office for Europe, 2019 (WHO-EURO-2019-3778-43537-61153). (Leiðbeining fyri framseting av hagtølum.)
10. World Health Organization. *Human papillomavirus vaccines: WHO position paper, May 2017*. Weekly Epidemiological Record, 2017. https://iris.who.int/server/api/core/bitstreams/d939f27c-5b7b-4377-b4dd-829ad4fb17ab/content
11. Hammer T, Lophaven SN, Nielsen KR, et al. *The Faroese IBD Study: Incidence of Inflammatory Bowel Diseases Across 54 Years of Population-based Data*. Journal of Crohn's and Colitis, 2016. https://doi.org/10.1093/ecco-jcc/jjw050
12. Geiger M, Rees F, Lilleholt L, et al. *Vaccination readiness*. https://www.vaccination-readiness.com/measure/ (vitja 6. november 2025). (Grundarlag fyri teimum sjey komponentunum av koppsetingarvilja.)
13. Funk T, Nørgaard SK, Hallundbæk L, et al. *Effect of a proactive childhood vaccination reminder system on vaccination coverage and uptake in Denmark: A register-based cohort study*. Vaccine, 54, 126934, 2025. https://doi.org/10.1016/j.vaccine.2025.126934
14. Suppli CH, Rasmussen M, Valentiner-Branth P, et al. *Written reminders increase vaccine coverage in Danish children — evaluation of a nationwide intervention using The Danish Vaccination Register, 2014 to 2015*. Euro Surveillance, 22(17), 2017. https://doi.org/10.2807/1560-7917.ES.2017.22.17.30522

13 Fylgiskjøl

13.1 Fylgiskjal 1: Tøl frá stabbamyndunum fyri koppsetingarluttøku

Talvurnar niðanfyri vísa tølini aftan fyri stabbamyndirnar fyri DiTeKiPol-Hib, pneumokokkar, MFR og DiTeKiPol-endurkoppseting — ein talva fyri hvønn skamt: lutfallið koppsett, lutfallið sum ikki var búsitandi í Føroyum í tilmælda koppsetingaraldri og lutfallið sum búði í Føroyum í tilmælda koppsetingaraldri, men ikki eru koppsett. Hvørt rað telur 100 %. * merkir, at øll í árganginum ikki hava rokkið tilmælda koppsetingaraldrinum við árslok 2025.

Talva 7.1 — DiTeKiPol-Hib 3 mðr

Árgangur	Koppsett %	Búsitandi uttanlands %	Búsitandi í FO, ikki koppsett %
2012	77,2	19,7	3,1
2013	79,6	18,6	1,8
2014	78,7	19,4	2,0
2015	77,8	19,8	2,4
2016	80,7	17,1	2,2
2017	81,4	16,3	2,3
2018	81,9	15,2	2,9
2019	81,3	16,2	2,5
2020	87,8	11,0	1,2
2021	87,2	9,2	3,6
2022	88,2	8,7	3,1
2023	90,0	7,0	3,0
2024	89,9	4,6	5,5

Talva 7.2 — DiTeKiPol-Hib 5 mðr

Árgangur	Koppsett %	Búsitandi uttanlands %	Búsitandi í FO, ikki koppsett %
2012	76,1	20,5	3,4
2013	78,4	19,3	2,3
2014	77,3	21,1	1,6
2015	77,8	19,8	2,4
2016	81,2	16,7	2,1
2017	81,5	15,8	2,7
2018	82,9	14,7	2,4
2019	82,0	15,5	2,5
2020	87,7	10,8	1,6
2021	89,7	8,5	1,8
2022	87,9	8,4	3,7
2023	90,0	6,8	3,2
2024	92,1	4,1	3,8

Talva 7.3 — DiTeKiPol-Hib 12 mðr

Árgangur	Koppsett %	Búsitandi uttanlands %	Búsitandi í FO, ikki koppsett %
2012	76,4	20,1	3,5
2013	79,8	17,4	2,9
2014	76,3	20,7	3,0
2015	79,1	18,2	2,7
2016	82,7	14,7	2,6
2017	84,2	13,7	2,1
2018	83,7	13,1	3,2
2019	83,2	13,2	3,6
2020	86,6	10,1	3,3
2021	89,1	7,4	3,5
2022	89,4	7,2	3,4
2023	91,0	4,6	4,3
2024	79,7	1,7	18,7

Talva 7.4 — Pneumokokkar 3 mðr

Árgangur	Koppsett %	Búsitandi uttanlands %	Búsitandi í FO, ikki koppsett %
2012	76,7	19,7	3,6
2013	78,4	18,6	3,0
2014	77,7	19,4	3,0
2015	77,5	19,8	2,7
2016	80,5	17,1	2,4
2017	80,7	16,3	3,0
2018	81,8	15,2	3,0
2019	81,1	16,2	2,8
2020	87,8	11,0	1,2
2021	86,8	9,2	4,0
2022	88,2	8,7	3,1
2023	90,0	7,0	3,0
2024	89,9	4,6	5,5

Talva 7.5 — Pneumokokkar 5 mðr

Árgangur	Koppsett %	Búsitandi uttanlands %	Búsitandi í FO, ikki koppsett %
2012	74,3	20,6	5,1
2013	77,7	19,0	3,3
2014	76,7	21,1	2,2
2015	77,1	19,8	3,1
2016	80,9	16,7	2,4
2017	81,0	15,8	3,2
2018	82,4	14,7	2,9
2019	81,5	15,5	3,0
2020	87,4	10,8	1,8
2021	89,5	8,5	2,0
2022	87,6	8,4	4,0
2023	90,0	6,8	3,2
2024	91,4	4,1	4,5

Talva 7.6 — Pneumokokkar 12 mðr

Árgangur	Koppsett %	Búsitandi uttanlands %	Búsitandi í FO, ikki koppsett %
2012	75,3	20,4	4,3
2013	78,1	17,4	4,5
2014	75,5	20,7	3,7
2015	77,5	18,5	4,0
2016	80,9	14,7	4,3
2017	84,0	13,4	2,6
2018	82,2	13,3	4,5
2019	81,8	13,3	4,9
2020	85,3	10,2	4,5
2021	87,0	7,4	5,5
2022	89,0	7,2	3,9
2023	90,5	4,6	4,8
2024	78,7	1,7	19,7

Talva 7.7 — MFR 15 mðr

Árgangur	Koppsett %	Búsitandi uttanlands %	Búsitandi í FO, ikki koppsett %
2012	74,9	19,8	5,2
2013	77,9	16,8	5,3
2014	75,9	19,2	4,9
2015	77,0	17,4	5,6
2016	83,5	12,9	3,6
2017	83,7	12,5	3,7
2018	80,8	12,8	6,4
2019	82,2	12,2	5,6
2020	82,0	9,7	8,3
2021	85,6	6,9	7,6
2022	84,2	6,0	9,9
2023	85,2	4,5	10,3
2024	47,9*	0,7*	51,4*

Talva 7.8 — MFR 4 ár

Árgangur	Koppsett %	Búsitandi uttanlands %	Búsitandi í FO, ikki koppsett %
2012	79,9	13,3	6,8
2013	84,4	9,8	5,8
2014	84,3	10,0	5,7
2015	83,1	9,7	7,2
2016	85,1	6,9	7,9
2017	85,5	6,3	8,1
2018	84,9	5,5	9,6
2019	83,6	5,8	10,7
2020	81,4	3,4	15,2
2021	59,8	1,9	38,3

Talva 7.9 — DiTeKiPol-endurkoppseting (5 ár)

Árgangur	Koppsett %	Búsitandi uttanlands %	Búsitandi í FO, ikki koppsett %
2012	77,3	11,0	11,7
2013	83,4	8,4	8,2
2014	80,0	7,7	12,2
2015	80,4	7,1	12,5
2016	81,0	5,6	13,4
2017	81,4	4,7	14,0
2018	79,9	3,5	16,6
2019	78,6	3,0	18,4
2020	55,9	1,0	43,0

Niðanfyri er lutfallið “Búsitandi í FO, men ikki koppsett” (ljósabláu stabbarnir í Mynd 1–4) víst sum linjur fyri árgangir 2012–2024.



Mynd 17: Búsitandi í FO í tilmælda koppsetingaraldri men ikki koppsett — DiTeKiPol-Hib og pneumokokkar, árgangir 2012–2024. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.



Mynd 18: Búsitandi í FO í tilmælda koppsetingaraldri men ikki koppsett — MFR og DiTeKiPol-endurkoppseting (5 ár), árgangir 2012–2023. Kelda: Cosmic og Fólkayvirlitið, dátuúttak frá 31. desember 2025.

13.2 Fylgiskjal 2: HPV-koppsetingarætlanin í Føroyum

HPV-koppsetingarætlanin er broytt fleiri ferðir síðan hon byrjaði í 2009. Broytingar viðvíkjandi málbólki kunnu síggjast niðanfyri í talvuni:

Dagfesting	Broyting
1. jan 2009	Ókeypis koppseting til 14 ára gamlar gentur
1. juli 2010	Víðkað til gentur føddar 1995+, 13–14 ár
1. des 2012	Víðkað til allar gentur og kvinnur 12–28 ár
2. des 2015	Víðkað til allar kvinnur føddar 1985+
19. juli 2019	Ókeypis koppseting til dreingir 12–17 ár
28. sept 2023	Ókeypis koppseting til gentur og dreingir 12–17 ár

Frá koppsetingarbyrjan er koppingarevnið eisini broytt fleiri ferðir:

- **Januar 2009 – januar 2016:** Gardasil® (4-valent)
- **Februar 2016 – oktober 2017:** Cervarix® (2-valent)
- **Frá 1. november 2017:** Gardasil®9 (9-valent)

Frá januar 2009 til august 2014 skuldu tríggir skamtir til fyri at verða liðugt koppsett/-ur. Síðan august 2014 hevur verið standard við tveimum skamtum (Kelda: ssi.dk, august 2014.), men tríggir skamtir verða givnir, um barnið er eldri enn 14 ár, tá tað byrjar koppseting, ella um fleiri enn 13 mðr eru millum fyrsta og annan skamt.

Heilsustýrið

Eirargarður 2, 2. hædd
100 Tórshavn

(+298) 30 90 60
hst@hst.fo
www.hst.fo